# Dreymarnir gerast veruleiki

**FERÐAVINNA**

**Nógvir møguleikar eru fyri góðum og spennandi upplivingum í grønlendsku náttúruni.**

Snorri Brend

Hevur tú hug til ein krevjandi og langan upplivingartúr í Eysturgrønlandi?

Ein túr á sleðu í Sisimiut ella ein siglitúr í Ilulisaat?

Eitt róligt vikuskifti í Kangerlussuaq, ella eina summarferiu í Suðurgrønlandi, har tú fært at sanna, hví landið ber hetta navnið?

Hetta eru bert nøkur av teimum mongu tilboðunum, sum grønlendska ferðavinnan hevur at bjóða teim vitjandi.

- Vit siga tað so, at tað truplasta hjá tí vitjandi er at velja millum tilboðini. Men her kunnu vit hjálpa teimum, siga tey hjá ferðavinnuskrivstovuni Nordic Adventure í Grønlandi.

### Tilboð

Millum onnur tilboð hjá teimum eru hesi:

- Ferðast í nánd av brotnandi ísfjalli
- Klatra á ísfjøllum í Mið-, Suður- ella Eysturgrønlandi
- Vitja smábygdir, búgva í privatum grønlendskum heimum og uppliva mentanina heilt tætt
- Spæla ísgolf í Uummannaq
- Vitja garðin hjá Eiriki Reyða
- Baða í keldum sum hava 36 hitastig, umgyrd av kava og ísfjøllum
- Kava niður á ein hvalakirkjugarð og síggja tann ótrúliga gróðurin í íshavsins djúpum
- Búgva á íshotelli i Kangerlussuaq
- Búgva í iglo í Ilulissat
- Fara á hávaveiðu ella fiska
- Á hvalasafari
- Gongutúr á ógranskaðum
- Í tyrlu yvir Innlandsísin

# Bíligar flogferðir millum Nuuk og Kastrup

**Grønlendska flogfelagið Air Greenland lækkar prísirnar á øllum fráferðum sínum millum høvuðsstaðarnar báðar. – Hetta verður gjørt, fyri at kunnu standa okkum í kappingini um ferðafólkini, sigur flogfelagið.**

Snorri Brend

Ætlanin er at lækka prísirnar millum 10 og 30 prosent á øllum sløgum av ferðaseðlum.

Við hesum ætlar flogfelagið at signalera tann veruleika, at tey taka kappingina í álvara og gleða seg samstundis um, at henda nú verður viðskiftafólkunum at gagni.

– Air Greenland hevur í fleiri ár arbeitt fyri at kunna lækka prísirnar, heldur enn at hava stokkutar prískampanjur ella avsláttur til ávísar bólkar.

– Við hesi lækkingini ynskja vit at geva øllum ferðafólkum á hesi rutuni lut í okkara bíligu ferðaseðlum, sigur Michael Binzner, stjóri í flogfelagnum við grønlendska kringvarpið.




HART

*Tað krevur sín "mann" at luttaka í heimsins harðastu skíðrenning, men fleiri taka kortini gleðiliga við hesi avbjóðingi*

### Bert útlandið

Fyribils er henda lækkingin einans vend ímóti farleiðini millum Nuuk og Keypmannahavn, hóast fólk í grønlendska útjaðaranum helst eisini høvdu ynskt sær lut í hesum.

Hetta eru tey í leiðsluni í Air Greeland fult greið um:

– Vit vildu sjálvandi fegin kunnað bjóðað bíligar ferðir til allar kundar okkara. Men í fyrsta umfari verður tað bert gjørt her, ið tann veruliga kappingin er, sigur Michael Binzner.

At tað nú ber til at lækka prísirnar, kemur einamest av, at felagið hevur framt sparingar tey seinastu árini.

Grønlendska flogfelagið er m.a. farið undir eina tilgongd við at skift flotan út, nýggjum lønarsáttmálum og eina langsiktaða ætlan um effektiviseringar.

# Heimsins harðasta skíðrenning í 20 minusstigum

**Fjarstøðan er 160 kilometrar og teinurin er tvørtur um heyggjar og dalar í samfullar tríggjar dagar. Hinvegin er landslagið ótrúliga vakurt, og tað er uttan iva orsøkin til at fólk úr øllum heiminum leggja leiðina til grønlendska býin Sisimiut í apríl mánaði.**



Snorri Brend

"Heimsins harðasta skíðrenning".

Soleiðis verður hetta serstaka upplivilsið í grønlendsku náttúruni "Arctic Circle Race" umrøtt.

- Øll ið koma á mál hava vunnið, - um ikki annað á sær sjálvum, verður tikið til.

Henda skíðrenningin er vorðin tann avgjørda avbjóðingin hjá teimum, ið longu hava roynt øll heimsins skíð-marathon og framvegis hava hug at royna okkurt nýtt.

### Matgerð

Talan er veruliga um eina stóra avbjóðing fyri tey hundraðtals fólkini, ið hvørt ár leggja leiðina til Sisimiut.

Hitin – ella kuldin – kann koma heilt niður á minus 20 stig, og brattarnir eru krevjandi. Landslagið fer heilt upp í 2500 metrar á teininum.

Tvær nætur sova luttakararnir í smáum tjøldum á einum frystum vatni millum fjøllini, eftir at tey sjálv hava matgjørt sín egna náttúrða.

Omanfyri 100 skíðrennarar luttaka í hesum renninum á hvørjum ári. Í ár verður lagt til brots 8. Apríl og er hetta 15. ferðin at startskotið ljóðar.

Aftanfyri tiltakið standa fólkini í Arctic Circle Race, sum taka ábyrgd av trygdini hjá tí einstaka undir allari ferðini.